# Ísrael, útvarpið og Hamas

SVENNING AV LOFTI



Tað var ótrúligt at hoyra Høgna Mohr útvarpsmann seta Jørgen Niclasen, uttaríkisráðharra, einvegis spurningar í útvarpinum í gjár, sum um Ísrael var hin stóri syndarin í hesum eljustríði, sum fer fram í Gaza í dag. Spurningarnir tóktust vera einvegis og settir eftir Hamas-leisti.

Eingin, heldur ikki ísraelsmenn, eru fegnir um krígsstøðuna millum Hamas og Ísrael, ið elvir til mangar sorgarleikir, sum ein krígsstøða altíð ger.

**9.400 rakettir úr Gaza inn í Ísrael síðani 2003**
Men hvør er sannleikin og veruleikin aftanfyri ísraelsku álopini og innrásini í Gaza?

Síðani 2003 eru 9.400 rakettir og spreingivarparar sendir úr Gaza inn í Ísrael.

Í 2005 tók Ísrael seg úr Gaza sum ein part av "land fyri frið" politikkinum hjá Ariel Sharon. Túsundatals jøðar vóru noyddir at flyta úr húsum sínum í Gaza tí ísraelska stjórning hevði gjørt eina avtalu við palestinsku myndugleikarnar. Heilar ísraelskar bygdir og bygdaløg, á støðd við Klaksvík, vóru javnaðar við jørðina – av jødiskum myndugleikum, tí økið skuldi verða givið palestinsku myndugleikunum í Gaza. Vit sóu grátandi jøðiskar kvinnur og børn, sum vóru rikin úr heimum sínum, sum ein partur av eini friðaravtalu.

Nú skuldi alt verið gott. Palestinar høvdu fingið síni krøv uppfylt. Ísrael var farið úr Gaza. Á, nei, víðgongdu rørslurnar við Hamas á odda, vóru ikki nøgdar.

Síðani Hamas tók valdið í Gaza hevur verið púra galið. Teir hava sent rakettir í hópatali inn yvir ísraelskar bygdir og sært og dripið nógvar ísraelar hesi seinastu árini. Mestsum hvønn tann einasta dag hava rakettir verið sendar úr Gaza inn í Ísrael, uttan at heimsins tíðindastovur hava latið við seg koma. Tá mótmæltu grannar okkara Noreg, Ísland og onnur lond ikki. Og tá vóru heldur ongar kravgongur í hesum londum.

**Í 2008 vóru 3.200 rakettir og spreingivarparar send úr Gaza inn í Ísrael**
Serstakliga býurin Sderot hevur verið dýktur undir í rakettum frá Hamas. Mestrsum hvønn dag í ár so mong hava íbúgvararnir í Sdereot og aðrastaðni verið noyddir at fara í bumbuskýli. Men hetta hevur ongan umrøðuáhuga havt hjá heimsins tíðindastovnum.

Í vápnahvíldartíðarskeiðinum millum Hamas og Ísrael 19. juni til 19. desember í fjør sendi Hamas 543 rakettir og spreingivarparar inn í Ísrael.

**Hams hevur skotið rakettir av handahógvi**
Øll hesi raktett- og spreingivarparaálopini úr Gaza hava verið gjørd við tí endamáli at oyðileggja og drepa so nógvar jøðar sum gjørligt, børn, kvinnu og menn. Ongi hernaðarmál hava verið nær í námind av har sum rakettirnar hava rakt. Nú ein dagin varð ein barnagarður í Ísrael raktur.

Síðani álopini úr Gaza byrjaðu í 2001 hava 28 fólk í Ísrael latið lív, summi av hesum hava verið palestinar og arbeiðarar úr øðrum londum, sum hava arbeitt í Ísrael.

Í hesum sama tíðarskeiðinum, 2001-2008 eru 1000 fólk í suður-Ísrael særd av somu rakettálopum. Í heili 8 ár hava ísraelsmenn verið dýktir undir í rakettum og spreingivarparum úr Gaza. Rakettirnar hjá Hamas í Gaza kunnu í dag náa 750.000 av ísraelsku íbúgvunum.

**Eitt verjustríð**
Hetta eru nakrir av veruleikunum aftan fyri ísraelska álopið á Hamas, sum er longdi armurin hjá iranska stjórnini í Teran, ið føðrar Hamas við vápnum. Hesi bæði ynskja at Ísrael verður strikað av landakortinum og at allir jøðar verða dripnir. Tí skal stríð Ísraels við Hamas skiljast sum eitt verjustríð fyri borgarar landsins – sum at sleppa at liva í friði í egnum landi.

---

# Prinsippspurningur

HANS J. HERMANSEN
hajah@olivant.fo



**Nýggja árið:** Jólini eru farin aftur um bak, og vit eru eisini farin um gáttina inn í nýggja árið. Gávurnar eru pakkaðar út, fýrverkið er farið í luftina, og sjáldsama nógvar neyðrakettir vóru at síggja á himmalinum í góðveðrinum, tá ið vit lupu úr gamla árinum inn í tað nýggja – kanska lýsa tær veruleikan so rámandi. Viðvíkjandi gávunum man vera ymiskt, hvussu skurðurin hevur verið, men óivað skarst betur næstseinastu jól enn hesa ferð – hjá teimum flestu.

Løgmaður rópti varskó viðvíkjandi framtíðarvánunum. Daprasta myndin er kanska, at " okkum tørvar, sum altíð, vit og skil" - hvussu tað so skal skiljast?

Jólagávan frá okkara kosnu kvinnum og monnum var sær sjálvari lík: Onnur hondin letur, og hin dregur dupult inn. Tey, ið hava størstu hjálp fyri neyðini, og tey, ið formáa sær minst, verða - á fólkaræðisligan hátt - dømd at lata mest.

Eins og við bleytu jólagávunum verða tey bleytu politisku evnini skjótt gloymd, men spennandi var at bíða - so leingi tað vardi.

**Sparingar**
Spart verður í ólukku máta: Dagtilhaldini fyri eldri verða spard burtur, javningarprosentið verður lækkað, útbúgving og annað í tí sambandi verður skert, viðurskiftini hjá eldri og yngri versna yvirhøvur, men hørð virði verða uppraðfest - so at fremmandafólk kunnu lættliga vitja oyggjarnar. Forvitnisligasta upplivilsið hjá hesum gestum verður óivað at síggja, hvussu okkara gomlu liggja órøkt og ungdóminum tørvar sømilig kor.

Fíggjarlógin komandi hevur 506 milliónir í halli. Hallið hevði verið størri, um yngri og eldri endin av okkara borgarum varð ikki noyddur at hjálpa til at avmarka tað.

**Blokkurin**
Nú komi eg til tað, sum er kjarnin í hesum skrivi: Hvussu ber tað til, at vit lata hundratals milliónir, sum vit eiga av røttum, liggja niðurfrystar í danska statskassanum, samstundis sum vit tyngja okið á okkara veikastu samfelagsborgarum - bara fyri at pynta komandi fíggjarlóg?

**Olmussa**
Havi roynt at spyrja meg fyri hjá fólki, ið eg haldi hava skil fyri tílíkum: politikarum, fólki við hægri útbúgving, grannskoðarum og øðrum skilafólki, og altíð er svarið tað sama: Hetta er ein prinsippspurningur. Spyrji eg síðan, hvat prinsippið er, fái eg at vita, at tað er skomm at taka ímóti hesum peningi. Spurningurin um, hví tað er skomm, verður vendur í luftini, og áðrenn eg eri liðugur at spyrja, fái eg svarið: tí tað er olmussa!

Eg vendi mær hámur burtur og kenni meg næstan sum Ketil, at eg havi dittað mær at spyrja so býtt og uppaftur verri: at eg skilji tað ikki. Eg man vera nakað tornæmur, tá ið eg skilji ikki tílíkan barnalærdóm. Ája, býttur kann man vera. Mín barnalærdómur var, at skeivt var ikki at skoyta um nakað, ið mær var boðið. Ája, mangt er broytt.

Síðan verður ikki spurt meiri um hatta. Óivað skal eg hava álit á tílíkum fólki, tí tey hava verið í lótum fyrr. Hugsa bara um kreppuna í -92 og um, hvussu skjótt tey hjálptu okkum burtur úr henni. Tey høvdu tíbetur onga ábyrgd av teirri kreppuni, sambært Hvítu Bók – og tað hava tey forrestin heldur ikki hesa ferð eftir tí, ið eg skilji, tí nú er kreppan heimsumfatandi. Vit eru heldur ikki so illa fyri – enn.

**Prinsippið**
Havi ikki skilt prinsippið um niðurfrysta blokkin reiðiliga, so eg leitaði eftir einum hvørjum øðrum, ið kundi opinbera fyri mær, hvat tað er, sum eg skilji ikki. Jú, mín sann, á Heimasíðu Tjóðveldis stóð soleiðis (havi loyvt mær at strika undir tað, sum eg haldi hava týðning):

"Blokkstuðul átti at itið árligt leigugjald fyri vald og vantandi politiska ábyrgd.

Fólkatingið hevði í dag (04.12.2008,hjh) aðru viðgerð av uppskotinum til ríkisveiting til Føroya fyri 2009, har blokkstuðulin verður óbroyttur.

Einasti, ið tók orðið, var Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, sum eisini einsamallur hevur skrivað minnilutaálit í málinum.

Fólkatingsumboðið hjá Tjóðveldi boðaði frá, at hann fór at atkvøða ímóti málinum, tí Tjóðveldi ístaðin mælir til samráðingar millum donsku stjórnina og landsstýrið um eina skipaða niðurlaðing av blokkstuðlinum yvir eitt hóskandi áramál.

Høgni Hoydal vísti á, at talan er um eitt "mikroskopiskt" mál fyri Fólkatingið, tí føroyski blokkstuðulin er bert 0,1% - ein promilla - av donsku fíggjarlógini. Men í Føroyum er framvegis talan um eitt stórt mál, sum stýrir øllum politiskum avgerðum og fastheldur Føroyum í eini støðu, har onki broytist, og har vit ikki hava atgongd til altjóða samfelagið, sum kann skapa inntøkur og menning.

Hann helt, at skulu vit rópa viðurskiftini við røttum navni, so átti blokkstuðulin í Danmark at havt heitið "árligt leigugjald fyri territorium og stórpolitiskar fyrimunir í Norðuratlantshavi". Og í Føroyum átti blokkstuðulin at havt heitið "gjald fyri at sleppa undan politiskari og búskaparligari ábyrgd".

Høgni Hoydal vísti á, hvussu stórt stig tað var, tá fullveldislandsstýrið valdi at minka blokkstuðulin í 2001 og fastlæsa hann á somu krónuupphædd. Hetta hevði eftir donskum viðurskiftum svarað til, at Danmark segði nei takk til millum 100 og 120 milliardir krónur árliga á síni fíggjarlóg. Varð hetta stigið ikki framt í 2001, so hevði blokkstuðulin í dag verið komin upp á 1,4 milliardir um árið - og føroyski búskapurin hevði uttan iva langt síðani verið farin á heysin aftur, segði Høgni Hoydal.

Somuleiðis segði tjóðveldisumboðið á Fólkatingi, at nýggjasta prógvið um, at blokkstuðulin er eitt amboð til politisk vald, ið stýrir føroyskum politikki var, at CHE-samgongan slitnaði júst orsakað av avtaluni um at minka blokkstuðulin við 117 mió. afturat.

Tí mælti hann til, at føroyska landsstýrið og danska stjórnin taka upp samráðingar um at niðurlaða blokkin og at Føroyar ístaðin taka fulla ábyrgd av uttanríkispolitikki og altjóða samstarvi, sum er lykilin til at menna Føroyar sum eitt nútímans samfelag." (endurgeving liðug).

Havi tað framvegis sum Ketil. Visti ikki, at blokkstuðulin var lyklaspurningurin í samgongu-slitinum, men so er tað komið upp á pláss – tó eg skilji framvegis líka lítið, ja, nú standa bara fleiri ósvaraðir spurningar. Eina løtu kenni eg meg sum eina samanbræðing av Sokrates og Ketli.

Fari at enda at biðja onkran, ið hevur skil fyri tí, t. d. Høgna Hoydal, um at gera so væl alment at greiða mær – og kanska øðrum eisini – frá spurningunum:

1. Hvussu nevnist blokkurin í veruleikanum?
2. Hví verður blokkstuðul veittur Føroyum?
3. Verður hann roknaður út eftir ávísum leisti?
4. Um ja, hvussu sær tann leisturin út?
5. Verður blokkstuðul veittur Grønlandi eftir sama leisti, sum hann verður veittur Føroyum?
6. Ætlar Grønland at niðurfrysta ella niðurlaða blokkin?
7. Er á nakran hátt gjørligt at fáa hendur á niðurfrysta partinum, um tað kundi hjálpt?
8. Hevði ikki verið rættast at havt fólkaatkvøðu um so álvarsligt mál sum at niðurfrysta blokkin?
9. Er framferðin røtt og lóglig í sambandi við niðurfrystingina av blokkinum?

**Á sama báti?**
Nú, ið ísurin bráðnar frá Arktis til Antarktis, mátti niðurfrysti blokkurin eisini tiðnað eitt sindur. Um onkur er, ið hevur tað á sama hátt sum eg, hevði eg fegin at frætt. Tað er so einsligt at kenna seg uttanfyri, tá ið øll hini vita, hvat tosað verður um. Tú torir illa at rætta fingurin upp og siga, at tú hevur einki skilt. Nei, so situr tú heldur stillur og letst at skilja alt, júst sum í søguni hjá H. C. Andersen: "Nýggju klæði keisarans". Tó, uggi hevði verið at frætt frá onkrum á sama báti sum eg, tí spurningurin er, um vilji løgtingsins og landsstýrisins er tann sami, sum meirilutin av fjøldini vil. Gjógvin millum veljara og vald tykist bara gerast breiðari, sum tíðin líður. Sum sagt hevði verið áhugavert at frætt frá øðrum, ið hava ilt við at skilja grudgevingina fyri, hví vit klára okkum betur við minni.

**Við ynskinum um eitt gott nýggjár.**

**E. S.:** Havi frætt, at partur av fólkatingssamsýningini hjá øðrum fólkatingsumboði føroyinga fer til politiskt virksemi hjá Tjóðveldi. Í tí sambandi er áhugavert at frætta, um so er, og um samráðingar eru um at niðurlaða tann blokkin.

**E.E.S.:** Havi somuleiðis frætt, at allir føroysku politisku flokkarnir - uttan ein - fáa fíggjarligan stuðul til politiskt virksemi úr Danmørk. Er hetta so?